# Tjóðveldi er í ringum lag

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**Av eini ella aðrari orsøk er Tjóðveldi í sera ringum lag fyri tíðina, og hetta hevur bara økt um trongdina til at fáa umrøðu í fjølmiðlunum. Men ikki kann sigast, at evnini, sum tey blása upp fyri almenninginum, eru serliga áhugaverd ella viðkomandi**

Tjóðveldi sendi í farnu viku tvær klagur – eina til løgmann og eina til formansskap løgtingsins, viðvíkjandi trimum landsstýrisfólkum og einum av næstformonnunum í løgtinginum. Hetta, at klagað verður um fýra politikarar í somu viku, man vera nýtt føroyskt met. Men umframt hesar klagurnar hava tey eisini grenjað í fjølmiðlunum um alt millum himmal og jørð hesa seinastu tíðina.

Vit fingu nú ein dagin at vita, at Tórbjørn Jacobsen var í øðini um sendingina X-faktor, og at hann hevði ikki sjónvarp heima við hús. Tað í sær sjálvum er í finasta lagið, men eg veit bara ikki, hví tað skal varpast út í fjølmiðlunum. Fyri meg kann tað í hvussu so er vera líkamikið, hvørjum næstformaðurin í Tjóðveldi tímir at hyggja eftir, og hvørjum hann ikki hyggur eftir. Tað næsta sum hendi var, at sami maður (við ongum sjónvarpi), var í øðini, tí Dagur og Vika varð flutt. - Kann tað ikki gera tað sama, tá maðurin kortini ikki hevur sjónvarp? Og nú skrivar Portalurin, at Tobbi hevur ynskt Lindu tillukku. So vita vit tað, men munnu ikki fleiri onnur eisini hava ynskt henni tillukku, uttan at tað kemur á Portalin?

**Klaga um ein næstformann**
Nú er Tjóðveldi farið undir eitt nýtt átak, sum er at senda klagur til løgmann og formanskapin í løgtinginum (og sjálvandi eisini tíðindaskriv til fjølmiðlarnar, har boðað verður frá, at tey hava klagað).

Fyrsta klagan var um John Johannesen, sum eftir mínum tykki segði meira enn gott var, tá hann sat í formanssessinum. Men rætt skal vera rætt, hann segði ikki meira enn tað, sum so øðiliga nógv onnur hugsa. Hví í allari víðu verð skulu Sosialurin, Portalurin, Rás 2 og onnur boða øllum føroyingum frá, hvussu lagið broytist á tjóðveldisfólki frá degi til dags? Eg eri eisini í ringum lag viðhvørt, men eg fari ikki í bløðini við tí. Hetta er farið at minna um ta tíðina, tá Útvarpið hvønn morgun mátti siga, hvussu nógvan febur Boris Jeltzin hevði.

**Klaga um landsstýrisfólk**
Sjálvandi hevur næstformaðurin í Tjóðveldi rætt í tí, at landsstýrisfólk eiga at vera í tingsalinum, tá mál sum viðvíkja teirra málsøkjum eru til viðgerðar. Tey eiga at vísa áhuga fyri øllum, sum hevur við teirra málsøki at gera, eisini tá uppskot frá øðrum eru til viðgerðar. Frávera signalerar manglandi áhuga. Men tá tað er sagt, so haldi eg, at viðgerðin í tinginum mangan fer sera langt burtur frá málinum, og ein av teimum ringastur at órógva tingviðgerðirnar, er júst sami maður, sum nú hevur klagað landsstýrisfólkini fyri ikki at tíma at lurta eftir sær. Eg haldi avgjørt ikki, at hann sum ákærir er nøkur góð fyrimynd, hvat atburði í tingsalinum viðvíkur.

Annars er hetta við at vera burturstaddur ikki bara galdandi fyri landsstýrisfólk. Løgtingið viðgjørdi í farnu viku eitt uppskot frá Tjóðveldi um at skipa Føroyar sum fullveldi. Tá vóru ikki færri enn 5 tinglimir hjá Tjóðveldi burturstaddir, so um uppmøtingin avspeglar áhugan fyri málinum, so sigur tað ikki so lítið.

# »Jag trodde englarna fans – bara, bara i himmelen«

HERGEIR STAKSBERG



Men nei, eg kundi ikki farið meir skeivur. Vit hava so sanniliga eisini einglar gangandi millum okkum deyðiligu her í Føroyum. Tað eru okkara fólkavaldu prógv fyri. Nú tá mann gekk og helt, at nú kundi ikki vera nakað krút eftir í teimum, so hála teir enn eitt ess úr ermuni. Teir hava megnað at yvirtikið veðurstøðina og harvið tikið eitt risa stig móti veruliga frælsinum

Stuttsíðani skrivaði eg ein lista yvir alt tað fantastiska, sum okkara fólkavaldu hava avrikað, men tað skuldi ikki ganga long tíð, til enn eitt undur skuldi síggja dagsins ljós. Hvør flogvitið handan hugskotið er, veit eg ikki, men viðkomandi hevur eina standmynd uppiborið ella í minsta lagi eitt motiv á veðurballónina.

Ein klókur maður av Viðareiði slongdi stuttsíðani um seg við gullkornum í blaðnum »Norðlýsið«, har hann segði nøkur vísdómsorð um akademikarar í Havn. Hesin maður má sigast hava verið framman fyri sína tíð, tí ikki fyrr enn nú síggja vit í verki, hvat hevur meir at siga: Fróðskaparsetrið ella veðurstøðin? Sjálvandi er tað veðrið. Tað er da klárt. Tað er sum at samanbera Pól Pot við Mahatma Gandhi... og sjálvt um ein veðurstøð er tengd at akademikarum, so er tað ikki tað, vit tosa nú, og akademikarar eru eisini fullkomuliga óreleventir í hesum samanhanginum.

Nú hava vit føroyingar nakað so fantastiskt sum frælsa sól, frælst regn, frælsan kava og ikki minst frælsan vind. Nú sleppa vit endiliga at fáa okkara egnu føroysku luft. Okkum nýtist bara at opna vindeygað og lata tað frísku, og ikki minst frælsu, luftina kela fyri okkara nasagluggum, samstundis sum vit fylla okkara lungu við frælsari ilt, sum síðani fer víðari út í okkara blóð. Hetta er tað! Hetta er meiningin við lívinum!

**Lat okkum gera paradísið Føroyar enn betri**
Áðrenn eg fari at viðmæla eina standmynd av manninum av Viðareiði, so ætlaði eg sjálvur at koma við nøkrum uppskotum, sum mær persónliga dámar rættiliga væl. Hvat við at gera ein ringveg, sum skal verða ein undirsjóvartunnli, sum fevnir um allar Føroyar? Áðrenn tú kolldømur uppskotið, nevn mær so **ein** persón, sum ikki bleiv rørdur til táranna, tá ein kvinna av Sandoynni handaði Bjørt Samuelsen eitt blómutyssi, sum var følnað, og segði ódeyðiligu orðini: »um vit ikki fáa ein undirsjóvartunnil til sands, so verður tað sorg og deyði... og tað er hetta, sum følnaða blómutyssið symboliserar... sorg og deyða«, leysliga siterað frá minninum. Tað er væl sagtans ikki tað, sum vit vilja okkara fólki ha? Sorg og deyða?

Eitt annað boð, nú tá tann geniali íslandssáttmálin endiliga er komin í gildi, er, at vit skulu yvirtaka skuldina hjá Íslandi. Á tann hátt fáa vit á skjótasta og skilabesta hátt veruligt frælsi! Tí tað er prógvað ferð eftir ferð, at meir pengar mann hevur, meir brúkar mann. Hetta er reinur logikkur og ein enn logiskari niðurstøða má tískil verða, at pengar eru ein byrða fyri eitthvørt samfelag. Hinvegin, um vit yvirtaka skuldina hjá íslendarum, so fara vit at brúka minni pengar... og um tað gongur heilt væl, so fara vit slett ongar pengar at brúka!

**Magni og Tóroddur – hvørjaferð tú peikar, venda fýra fingrar móti tær sjálvum!**
Eg fari at enda við eini áheitan til allar mammureyvarnar og pessimistarnar, sum dáma eitt nr. ov væl at sutta upp á boppuna hjá Danmark, um ikki at lurta eftir dómadagsprofetum sum Magna Laksafoss, tá hann sigur, at ein kreppa er ávegis, tí har er ongin kreppa. Hon er fiktiv og er bara tosað í gongd. Slík tankagongd sum tann hjá Magna er skítfarlig, tí um mann fylgir hansara tankagongd, so kann mann risikera, at vit fáa pengar í kassan, heldur enn at koyra pengar úr kassanum.

Ein annar maður, sum tit fyri alt í verðini eisini mugu ignorera, er Tóroddur Poulsen. Hann er eisini skítfarligur, og tað kemur serliga til sjóndar í filminum »ein regla um dagin má vera nokk«. Í filminum sigur Tóroddur nøkur orð, sum onki oyra ella eyga hevur uppiborðið verða vitni til. Orðini hjá Tóroddi vóru somikið frek, ja, nærmast blasfemisk, at tað er við øgiliga ringum tannabiti, at eg velji at endurgeva tey, men eg trúgvi upp á, at mann skal lýsa báðar síður av eini søk. Og serliga, tá orðini hjá Tóroddi so tíðiliga vísa, at Tóroddur fór skeivur, meðan okkara fólkavaldu einglabassar høvdu rætt.

Her koma orðini: »tá politikarar tosa um at skapa nakað, so er tað at skapa útreiðslur«.

# Aðalfundurin í Atlantic Airways

ÓLAVUR PETERSEN

Parker Donham, partaeigari í Atlantic Airways, er komin til Føroyar til aðalfundin í A. A.

Vit kunnu vissa Passer Donham um, at vit føroyingar eru sera glaðir og ikki sørt erpnir av okkara flogfelag.

Vit sum eru komnir til árs, minnast alt ov væl viðurskiftini áðrenn Føroya Landsstýri setti A. A. á stovn.

Tá var tað ikki bara serstaka føroyska veðurlagið sum avgjørdi regularitetin av flogferðsluni uppá Føroyar, men samlaðu áhugamálini hjá útlendskum flogfelag.

At útlendskur kapitalur, og harav spretta vónandi nýggir møguleikar, koma inn í pinkulandi Føroyar, megu vit sum land og fólk heilsa vælkomnum.

Men ráðaætlanin millum leiðslu og privatar partaeigarar, sum fór fram í fjør, má fáa konsikvensir á aðalfundinum í morgin.

Við hópuppsøgnum í flogfeløgum og lufthavnum kring okkum, sleppur Atlantsflog heldur ikki undan strategiskum og kanska structurellum avgerðum.

Í hesum vondu tíðum megu vit føroyingar ikki missa A. A. av hondum, men í nóg góðari tíð tryggja okkum framhaldandi fast samband millum Føroyar og Danmark.

Uppundir aðalfundin hevur nógv verið tosað um valdsbýti.

Ein sera primitivur hugsunarháttur.

Høvuðsuppgávan hjá eini nevnd er at vera mótspælari til stjórnina. Ikki mótspælari í orðsins rætta týdningi, men samlaða nevndin skal hava førleika til í øllum viðurskiftum at framseta kritiskar og konstructivar spurningar.

Ikki minst at halda stjórnina til høvuðsendamál felagsins.